LØGTINGIÐ

Johan Dahl, løgtingsmaður
her

Landsstýrismálanevndin

**27. mars 2008**
**j. nr. 7.13-20080004[2] ks/td**
(at tilskila í svari)

*Sagt verður frá, at soljóðandi skriv í dag er sent Jóannes Eidesgaard, løgmanni:*

**"Viðvíkjandi áheitan frá Johan Dahl, tingmanni, um, at nevndin kannar tey viðurskifti, sum Jacob Vestergaard í fyrispurningi tann 12. mars 2008 sáar iva um, t.e. "viðurskiftini millum landsstýrismannin í fiskivinnumálum og Kongshavnar Útgerðarfelag og disposisjónir í felagnum"**
Við skrivi, dagfest 11. mars 2008, hevur Landsstýrismálanevndin fingið áheitan frá Johan Dahl, tingmanni, um, at nevndin kannar tey viðurskifti, sum Jacob Vestergaard í fyrispurningi tann 12. mars 2008 sáar iva um, t.e. "viðurskiftini millum landsstýrismannin í fiskivinnumálum og Kongshavnar Útgerðarfelag og disposisjónir í felagnum"

Málið varð viðgjørt á fundi í Landsstýrismálanevndini tann 26. mars 2008.

Tað hevur alment verið frammi, at løgmaður hevur sett eina nevnd at kanna hetta málið.

Landsstýrismálanevndin gjørdi á fundinum av at heita á løgmann um at upplýsa nevndina um arbeiðssetningin hjá nevndini, sum kannar hetta málið, og um niðurstøðuna hjá nevndini, tá hendan er liðug.

Avrit av hesum skrivi er sent Johan Dahl, tingmanni, til kunningar."

N.v.

Heidi Petersen
formaður

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

LOGTING.FO